# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tollakur Djurhuus 60 ár

Tollaksmessudag, fríggjadagin 23. desember, sum er í dag, verður Jóannes Tollakur Djurhuus í Havn 60 ár. Hann hevur í mong ár arbeitt á Skúlabókagrunninum.

Tollakur, sum er uppkallaður eftir føðingardegnum, er ættaður úr Vági. Foreldrini vóru Katrina, fødd Mortenssen og ættað úr Øravík, og Johan O. Djurhuus. Tollakur vaks upp í Tippinum í Vági.

Pápin var lærari í Vági frá 1931 og fram til 1972. Tá ið hann fór úr starvi, hevði hann verið skúlastjóri síðani 1936. Katrina og Johan Djurhuus fingu tvey børn. Tollakur eigur eina systir. Hon eitur Ása Djurhuus. Hon býr eisini í Havnini og er gift við Sigmundi Poulsen.

Johan var føddur 20. juli í 1904 og doyði 17. januar í 1987. Katrina var fødd 12. mars í 1915 og doyði 15. august í 1999.

Tollakur leyk matematiskt studentsprógv í Hoydølum í 1965. Hann búði niðri í fleiri ár og arbeiddi eitt nú á Carlsberg og á skrivstovuni hjá telefonfelagnum KTAS.

Seinastu fjórðingsøldina ella so hevur hann arbeitt á Føroya Skúlabókagrunni. Tá ið hann varð settur í starv har, var hann í fleiri ár einsamallur á skrivstovuni og arbeiddi saman við nevndini, ið var mannað við lærarafólkum Nú eru tey betri mannað, og á heimasíðuni hjá grunninum verður sagt, at Tollakur er forlagsfólk. Tað vil eitt nú siga, at hann greiðir handrit til prentingar og harvið samskiftir nógv við prentsmiðjurnar. Har bøkurnar verða settar upp og prentaðar, verður tað sagt um Tollak, at hann er álítandi, nágreiniligur og hugflogsríkur.

Sum ungur var Tollakur nakrar túrar á sild við sluppunum City of Norwich og Havgásini, sum royndu við gørnum. Hetta var endin á fiskarínum eftir Norðhavssildini, sum føroyingar í nøkur ár høvdu fingið nógv burturúr. Í 1964 rokaðust teir, í 1965 var væl minni at fáa, og í 1966 bóru teir ongantíð við. Síðani er atlantisk skandinaviski sildastovnurin ongantíð rættuliga komin fyri seg aftur.

Tollakur er sera hugnaligur, fyrikomandi og sáttligur. Hann er innarlaga í samfelagsviðurskiftum, fylgir væl við í tíðindunum bæði burturi og heima, og hann er góður eygleiðari. Føroyska málið er hann ógvuliga góður við og stinnur í. Tá ið vágbingar spæla fótbólt í Gundadali, er Tollakur altíð millum áskoðararnar, og sum so mangir aðrir bygdarmenn í høvuðsstaðnum tekur hann á við B36.



Tollakur er giftur við Karini, sum er fødd Olsen og ættað úr Havnini. Tey eiga hugnaligt heim á Ovara Ternuryggi. Børnini hjá Karini og Tollaki eru Jóanna, sum er fødd í 1976, og Birgir, sum er føddur í 1979.

Føðingardagin heldur Tollakur í Sjónleikarahúsinum. Har eru øll væl komin frá klokkan 19 fríggjakvøldið. Sambandið við Sjónleikarahúsið er gamalt í familjuni hjá Karini. Pápi hennara, Jacob Olsen, vanliga nevndur Zahle, var í fleiri ár formaður í Havnar Sjónleikarafelag.

**J**

◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇

## Ferðsluvinur fylt fimmti

Mikudagin 21. desember fylti Ingi Gunnarsson í Hoyvík 50 ár.

Ingi er havnarmaður. Liðugur við realskúlan fór hann til skips og sigldi við nótabátinum Krúnborg í trý ár, áðrenn hann fór til Íslands í 1976 at ganga á fiskivinnuskúla, har hann tók útbúgving sum fiskivinnuatstøðingur í 1979.

Í 1982 tó hann hægri handilsskúlaprógv (HH), og síðan hevur hann arbeitt sum sølumaður hjá ymiskum fyritøkum. Hann arbeiddi t.d. hjá Kaj Andreasen, Atlas-búðini, Køksmiðstøðini og hjá elektronikkfyritøkuni Datronik. Hann var sølumaður hjá Landshandlinum í 10 ár. Í dag arbeiðir hann sum sølumaður hjá P/F Poul Michelsen heilsølu í Havn.

Ingi hevur stóran áhuga fyri ferðslutrygd, og herfyri varð hann kosin "Ferðsluvinur nr. 1" á einum átakið hjá Ferðslutrygd í SMS. Síðan 2000 hevur hann skipað fyri minningardegi teirra deyðu í ferðsluni hvønn fyrsta sunnudag í juli mánað.



Ingi er sonur Jørghild, f. Thomsen, úr Syðrugøtu, og Ingolf Gunnarsson úr Vági. Hann er giftur Unu Onghamar úr Havn, børnini eru Hallur og Bogi.

Føðingardagin var Ingi burturstaddur.

---

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Ester Davidsen,** Æðuvík, andaðist á Eysturoyar Røktar og ellisheimi 20. desember 82 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hóskvøldið kl. 19.

Jarðarferðin verður úr Nes kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

Tey ið vilja minnast Ester kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konto í peningastovnunum.

Kistan við **Jens Christian Dam,** ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Kaldbak fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum í dag klokkan 17 í Vesturkirkjuna.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni Tollaksmessudag klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Jens Christian kunnu lata eina gávu til Leguhúsið í Nesvík.

---

✝

Kunngjørt verður at góða mamma, omma og systir okkara

**Gunvør Petersen**
ættað úr Puntabyrgi í Trongisvági
búsitandi í Keypmannahavn

andaðist á Ríkishospitalinum 19. desember,
70 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Filipskirkjuni, Kastrupvej 57, Amager, mikudagin 28. desember kl. 11.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Svend og Lena**
**Hansa, Kalle, Edward og Finn**

---

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara elskaði sonur, beiggi og mammubeiggi

**Páll Poulsen**
Argir

andaðist sunnudagin 18. desember, 48 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Hebron á Argjum mikudagin 28. desember kl. 13.00.

**Mariel**
**Maria, Ásla og Bjørg**

Tey, ið vilja minnast Páll, kunnu lata eina gávu til Hebron á Argjum, konto í Føroya Sparikassa.